# Kundi verið enn betri

## Tað var sum at vera í paradis at búgva á kampingøkinum á Summarfestivalinum, men har vóru ov fá vesi og ov lítið vatn, hildu fleiri

Randi Jacobsen

Hildið verður, at umleið 900 fólk hildu til á økinum, sum sett var av til húsvognar á Summarfestivalinum.

Alt økið livdi av tónleiki og hugna, fólk sungu og ballaðust, og børnini høvdu tað eisini gott.

Sum heilt lótu fólk væl at. Økið var beint við festivaløkið, mitt í býnum og stuttur vegur var til handils, har nóg mikið var at fáa. Økið kundi ikki verið betur valt, søgdu kampistarnir.

Í einum vogni hittu vit Demmus Ellendersen úr Øðravík og Tommy Tausen úr Vági. Tveir aðrir menn búðu í vogninum eisini.

- Hetta tiltakið er sera væl fyriskipað, men saniteru viðurskiftini kundu verið betri. Ov lítið vatn hevur verið í brúsubaðnum. Vesini hava riggað, men tey vóru ov fá, og tí kundi tað taka ein tíma at sleppa framat, søgdu teir báðir, sum annars hildu alt vera ótrúliga deiligt.

### Hittu nógv fólk

- Fólk ganga framvið, og við at búgva upp á henda mátan, kemur man at kenna nógv fólk. Nógv fólk hava eisini vitjað okkum. Eina ferð vóru eini 25 fólk inni hjá okkum í senn, ssøgdu suðuroyingarnir.

Í einum stórum tjaldi upp at einum húsvogni var eitt størri ferðalag. Har búðu ellivu fólk, og tey vóru úr Dali, Kirkjubø og úr Havn.

- Hetta er eitt deiligt pláss, eitt paradís, søgdu tey.

### Fingu parkeringsbót

Tó gramdu tey seg um, at ov fá vesi vóru og ov lítið vatn í brúsuni. Tað má man kunna vænta, tá ið man rindar 1200 krónur fyri plássið.

Tey høvdu havt eina óvæntaða løgna uppliving, við tað at tey valdu at koma longu seinasta sunnudag.

- Mánamorgun kom ein parkeringsvakt til okkara og segði, at vit vóru komin ov tíðliga, og hann gav okkum bót. Onnur høvdu eisini fingið bót, men vit søgdu kortanei at gjalda bótina, fóru á kunningarstovuna at klaga, og so var tað í lagi.

### Ov myrkt og óslætt

Hesi fólkini kundu annars hugsað sær, at gøtuljós vóru á plássinum, tí ilt var at finna húsvognin aftur í skýmingini.

Onnur fólk peikaðu á, at kommunan kundi havt slættað økið betur við at koyra skerv á. Holini vóru so djúp, at trakkaði onkur í eitt av holunum, fekst upp í skógvarnar, og tað var meira enn so, at børn fingu karm.

Við brúgvarnar á Stongunum var eitt serligt umhvørvi við bátunum, og tjaldpláss vóru ymsa staðni.

### Alt beint við

Oman fyri KFUM var eitt økið ætlað til familjur burturav.

Har hittu vit Peter J. Jensen og Jóannes Guttesen, sum sótu uttan fyri og hugnaðu sær, meðan børnini spældu. Fimm húski vóru saman.

- Her er gott at vera, og bóndin er blíður. Hetta er mitt í býnum men kortini friðarligt, søgdu teir.

Eitt kvøldið høvdu nakrir ungir dreingir hug at garta, men bóndin var kvikur at reka teir burtur, tí tað skuldi vera friður á familjuøkinum.

Teir báðir hildu økið vera væl valt. Handil var beint við. Børnini kundu fara á spæliplássið við KFUM, og stuttur vegur var yvir í svimjihøllini.

Fríggjakvøldið var fótbóltsdystur, somuleiðis beint við.

- Tað kundu verið fleiri vesi, men vit kundu brúka vesið hjá bóndandum, so tað var til at liva við. Alt er gott, bara tað er so nøkulunda turt.

- Tað er heilt vist, at vit koma aftur, søgdu teir báðir.

Og tað sama søgdu fleiri aðrir gestir.



*Økið, har húsvognarnir stóðu, var sum ein stór bygd, og fólk hugnaðu sær óført*

# Gott at vera aftur

## - Tað var deiligt at spæla aftur á Summarfestivalinum, segði ein glaður og nøgdur Brandur Enni eftir konsertina, har nógv fólk var komið at lurta eftir barnastjørnuni, sum nú er blivin vaksin

Sissal Kampmann

– Tað eru fýra ár síðan eg havi spælt á SF seinast. – Fyri trimum árum síðan bleiv konsertin avlýst vegna veður, so tað er gott at vera aftur og spæla og njóta góða stemningin á festivalinum

### Brandur hevur alt!

Ein tónleikakønur áhoyrari helt fyri undir konsertini, at "Brandur hevur alt, ein tónleikari skal hava". Hann var eisini í toppformi, tá hann fór á Føroya Tele pallin leygarkvøldið. Við sær hevði hann beiggja sín, Trónd Enni, Heiðrunn Petersen á violin og Henning Nicodemussen á slagverki. Framførslan bjóðaði fyrst og fremst løg av nýggjastu fløguni, "Sometimes truth needs a lie". Løgini hjá Brandi vóru væl móttikin av fólkinum, ið vóru komin at lurta eftir barnastjórnuni, sum nú avgjørt er blivin vaksin.



**Blaðfólk:**
Óli Jákup Jacobsen
Sissal Kampmann
Dagfinn Olsen, samskipan

**Myndir:**
Jens Kristian Vang
Óli Jákup Jacobsen

**Meira frá Summar–festivalinum verður í blaðnum mikudagin**

# Intimkonsert í sirmi

## Pætur við Keldu spældi í heimbýnum og eini stórari áskoðarafjøld á lítla Føroya Tele pallinum í sirminum beint eftir Shu-Bi-Dua

Sissal Kampmann

Við sær hevði hann rutineraðar og dugnaligu tónleikararnar, Agnar Lamhauge, sum spældi bass, og violinleikaran, Heiðrunn Petersen. Saman spældi trioin eina intima og stilla konsert, sum var eitt kærkomið og væl hóskandi innslag eftir meir larmandi og hypaðu framførsluna hjá dønunum á Vágsbøi frammanundan.

### Fjølbroytt skrá

Á skránni vóru egin løg, sum "Dreams of Youth", "Som en drøm" , "Bright", sum Pætur hevur skriva til systirdóttir sína, Bjørt, og lagið "Hjartað", eisni kendur sum "Vælskapt brek", sum Pætur skrivaði til eina kapping., har hann gjørdis nummar tvey. Eisini spældu tey coverløg eftir svianum Bjørn Afzeius og klassikarar sum "Somewher over the Rainbow" og "Autum leaves". Tey trý vóru á einum máli um, at hetta var ein góð konsert og ein góð uppliving fyri tey sum tónleikarar, at framføra á Summarfestivalinum.

# Hamferð í egnum hami



## Hamferð vísti á Summar Festivalinum einafer enn, at bólkurin umboðar tað tyngsta í føroyskum rocktónleiki

Tungt, sint, svart. Hamferð er gott og ærligt og heilt víst tað tyngsta, sum er á føroyska pallinum í løtuni. Til slíkan tónleik krevst gott ljóð. Ljóðið var í ordan, men bólkurin hevði kanska fingið betri ljóð, um hann var á stóra pallinum.

Bólkurin er nýggjur, men hevur tungur, og hevur avgjørt uppborið teir festivalmøguleikar, sum hann hevur fingið í ár.

Eg hevði viljað hoyrt hendan bólkin á størri palli og størri ljóði, tó at framførslan í tjaldinum á Summar Festivalinum ikki var heilt OK.

Bólkurin er goður og gjøgnumførdur. Tað er so gleðiligt, at tað av og á koma slíkir bólkar, sum ikki bara eru harðir og myrkir,men har tað býr okkurt undir, so að merkist, at bólkurin meinar tað hann fæst við.

Hesa ferð flaksaði Flagstjaldið. Góð framførsla og væl var tað, at hon var flutt frá klokkan 20 til 00:00. Tað hóskaði betri til myrka tónleikin og skýmandi festivalin. Ærlig framførsla!

-do-